## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av vestri og yvirhøvur turt, men seinnapartin gul av ymsum ættum og stundum regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinni av vestri. Ælingur, partvís vátakavi, men onkur sólglotti. Hitin millum 1 og 5 stig.

# Eitt kosmiskt veitslu-fýrverk



STJØRNUFRØÐI
*Ingrid Bjarnastein*

Út á kvøldið sunnudagin siga stjørnufrøðingar, at meteor-riðilin Leonidirnar fer at hava sítt hæddarpunkt.

Meteor-riðilin, Leonidirnar, »brýtur út« hvørt ár umleið tann 17. ella 18. november, men hvussu ógvusligt tað er, broytist ár til ár. Í 1966 vóru umleið 150.000 stjørnuskot um tíman. Í 1999 vóru umleið 5000 meteorar um tíman, meðan í ár 2000 vóru bert nøkur hundrað hvønn tíma.

Væntanirnar til ár 2001 eru positivar. Væntað verður, at Leonidirnar fara at hava tvey »show« við stjørnuskotum tann 18. november. Tað fyrsta verður ikki møguligt at síggja á okkara leiðum, tí fer hetta at fara fram um morgunin. Hesa tíðina er tað myrkt í Norður-og Miðamerika.

Tá klokkan er vorðin í mesta lagi 18.20 sunnukvøldið verður stjørnuskotsaktiviteturin í hæddini. Tá kanst tú, um tað verður klárt í veðrinum væl at merkja, síggja upp til 5-8000 stjørnuskot um tíman. Hetta stóra talið byrjar tó at falla eftir klokkan 20.00.

Fyri fólk í Havnini merkir hetta, at tey skulu hyggja í ein landnyrring, millum Stong og Eystnes. Hyggjast skal eftir stjørnumyndini Leyvan – vinstrumegin Orionsbeltið.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷5 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 7 |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 7 |
| Tromsø | ÷2 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | ÷1 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 7 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 17 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 14 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 18 |
| Miami | 20 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 986 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer skjótt í landnyrðing.




Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing og verður yvir Føroyum sunnunáttina. Hátrýstið í útsynning úr Írlandi breiðir seg móti Føroyum í næstu viku.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/11 kl. $06^{00}$– 15/11 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 8,9°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 14/11 kl. $06^{00}$– 15/11 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í november: 65,4 mm

**Radio-verkstaður**

Umvæling av:
- Sjónvarpum
- Videotólum
- Hi-Fi

Vit umvæla:
PHILIPS
PANASONIC
SAMSUNG
og onnur merki

**Fokus ELEKTRONIK**
e n t n 1 rgir
lf. 31130 a 31130




## VESTFALLSKYRRINDI

11. nov.: Mánin næstur jørðini
15. nov.: Tendring
22. nov.: Fyrra kvarter
23. nov.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. nov | 07.01 | 19.27 | 06.01 | 18.27 | 06.16 | 18.42 | 09.01 | 21.27 | 10.01 | 22.27 | 05.16 | 17.42 | 04.16 | 16.42 | 07.16 | 19.42 | 08.16 | 20.42 | 06.46 | 19.12 | 08.01 | 20.27 |
| 17. nov | 07.53 | 20.20 | 06.53 | 19.20 | 07.08 | 19.35 | 09.53 | 22.20 | 10.53 | 23.20 | 06.08 | 18.35 | 05.08 | 17.35 | 08.08 | 20.35 | 09.08 | 21.35 | 07.38 | 20.05 | 08.53 | 21.20 |
| 18. nov | 08.46 | 21.12 | 07.46 | 20.12 | 08.01 | 20.27 | 10.46 | 23.12 | 11.46 | — | 07.01 | 19.27 | 06.01 | 18.27 | 09.01 | 21.27 | 10.01 | 22.27 | 08.31 | 20.57 | 09.46 | 22.12 |
| 19. nov | 09.37 | 22.02 | 08.37 | 21.02 | 08.52 | 21.17 | 11.37 | — | 00.12 | 12.37 | 07.52 | 20.17 | 06.52 | 19.17 | 09.52 | 22.17 | 10.52 | 23.17 | 09.22 | 21.47 | 10.37 | 23.02 |